tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Fólkafloksmaður hartar »sínar« egnu

## *Oddagrein*

TAÐ verður mangan sagt, at formaðurin í fíggjarnevndini, er ein tann mest týðandi persónurin í politisku skipan okkara, hóast hetta ikki er nakað, sum vit geva gætur dagliga. Tá uppfata vit løgmann og landsstýrismenninar, sum mest týðandi persónarnar í samfelagnum.Tá hetta er sagt mugu vit eisini gera okkum greitt, at tingumboð og landsstýrisumboð hava hvør sína uppgávu at røkja. Kortini er tað ein sannroynd, at eitt landsstýri situr, tí tað hevur ein meiriluta aftanfyri seg í tinginum. Nú er formaðurin í fíggjarnevndini ikki meirilutin í tinginum, og heldur onkur, at man skal ikki taka tað hann sigur fyri annað enn ein vanlig meining. Kortini má sigast, at úttalilsi hjá einum so týðandi politiskum leiðara í sjálvum løgmansflokkinum kunnu ikki annað enn verða tikin sum álvarsorð og sum ábendingar um, hvussu er stætt í samgonguni.

BJARNI DJURHOLM hevur fleiri ferðir verið frammi og talað „Roma beint ímót“. Tvs. ikki sjálvum løgmanni, sum er ein av hansara egnu, men her serstakliga fíggjarmálaráðharran, sum hoyrir til samgonguna. Nú ger hann so aftur vart við seg. Í Dagblaðnum í gjár sigur formaðurin í Fíggjarnevndini, at landsstýrið hevur sovið í tímanum. „Longu í 98 var greiði boðskapurin úr Danmark, at búskaparliga skiftistíðin fór at verða 3-5 ár. Kortini er einki gjørt til tess at tillaga føroyska búskapin til eina so stutta skiftistíð, og tí má sigast, at landsstýrið hevur sovið í tímanum“. Hetta er tað ein av leiðandi monnunum í løgmansflokkinum sigur við beinleiðis adressu til samgonguflokkin, sum eigur fíggjarmálaráðharran. Hann roknar eisini við, at tá árið er farið, verður meirnýtsla landskassans í 99 og 2000 millum 400 og 500 mill.kr. samanborið við nýtsluna í 98. Hann ivast ikki í, at neyðugt verður við álvarsligum inntrivum í búskapinum skulu vit megna eina so stutta skiftistíð, sum lagt er upp til. Tað fer at hava við sær, at livistøðið fer at lækka. Síðani leggur hann eisini eftir Tjóðveldisflokkinum fyri ikki at hava framt broytingar í almenna bygnaðinum til tess at tálma útreiðslurnar. „Ikki eitt einasta uppskot um tillaging og rationalisering av almenna sektorinum er komið í tingið“. Hann endar við at vísa á „at fyri summi tykjast broytingarnar í ríkisrættarligu viðurskiftunum bert at vera ein trúðarspurningur. Nú er sjón fyri søgn, at einvegis politisk dogmatisma ikki førir okkum á mál.“ Tað er eingin ivi um, at tingmaðurin við orðinum „summi“ sipar til Tjóðveldisflokkin og tjóðveldisfólk. Nú mugu vit rokna við, at Bjarni Djurholm og løgmaður javnan tosa saman, og at teir sum partamenn eru samdir í tí, ið kemur út alment á slíkan hátt. Tí mugu hesi orð hansara takast sum ein verulig ávaring til Tjóðveldisflokkin og harvið sum ein útstrakt hond til andstøðuna. Kanska tað eisini er eitt fyrsta tekin til, at samgongan er ikki so intakt longur. Tað sær ikki mætari út enn, at fólkafloksmenn desperat leita eftir einum høvi til at sleppa sær av við Tjóðveldisflokkin. Trupulleikin er ansa eftir ikki at missa andlit í fullveldismálinum.

***Sosialurin***

## Viðmerkingar:

# Demokratiið er komið til Føroya!

Nakað herfyri bað sjónvarpið okkum tey tíðindi, at teleslynga var løgd í tingsalin. Hetta vóru gleðiboð fyri okkum í Felagnum fyri Hoyribrekað! Alt síðan felagið varð sett á stovn fyri 8 árum síðani, hava vit gjørt vart við, hvussu stóran týdning tað hevur, at teleslyngur verða lagdar, har nógv fólk savnast. Hetta er eitt lutfalsliga bíligt hjálpartól til okkum, ið av einihvørji orsøk ikki hoyra væl. Ein stórur partur av føroyingum hevur niðursetta hoyrn, og eingin orsøk er til at halda, at hetta ikki eisini kann raka tinglimir – kanska serliga, tá teir eldast.

Nakað seinni frættu vit eisini, at Læraraskúlahøllin endiliga hevur fingið teleslyngu, eftir at ein av næmingunum staðiliga hevur arbeitt fyri hesum. Tað er eisini at fegnast um.

Á stovnandi aðalfundi okkara vóru gestir úr hinum norðurlondunum til staðar. Formaðurin í danska felagnum fyri hoyribrekað tók tá soleiðis til: »Í einum landi, sum ikki hevur teleslyngu í sínum parlamenti, har virkar demokratiið ikki!« Hetta hava vit mangan tikið til okkara millum, og tí vilja vit nú ynskja føroyingum til lukku við, at demokraitið er farið at virka. Vónandi fara tey bøttu hoyrilíkindini eisini at merkja, at Føroya Løgting í framtíðini fer at hava eitt opið oyra fyri teimum brekaðu her á landi!

**Felag fyri hoyribrekað í Føroyum**

# Føroyafrádrátturin fer ongan veg

Lesandi úr 17 londum fáa tað, vit so heimføðisligt rópa ”føroyafrádrátt” í Danmark. Hesin rættur fer ongan veg, fyri tað um Føroyar fáa fullveldi

Týsdagin hevur Sosialurin enn eina oddagrein um teir ræðuleikar, sum fara at raka okkum, um vit taka ábyrgdina av okkara egna landi. Endamálið er — sum tað hevur verið nú í tvey ár — at ræða fólk.

Týsdagin er tað m.a. rætturin hjá lesandi føroyingum til at vinna eina ávísa upphædd skattafrítt í Danmark — tann sonevndi føroyafrádrátturin — sum verður umrøddur. Og tey, sum skulu forskrekkjast, eru tey ungu, sum eru ella ætla sær undir útbúgving í Danmark.

Blaðið skrivar, at fáa føroyingar framyvir somu lestrarmøguleikar í Danmark sum aðrir norðbúgvar, fer tað at hava við sær, at vit missa rættin til føroyafrádrátt. Hvør skal siga: Hesi rættindi eru treytað av, at Føroyar eru undir donskum valdi.

**Norðurlendskur sáttmáli**

Sum so mangt annað er eisini hesin pástandur grundaður á skeivleikar.

Sáttmálin, sum tryggjar føroyingum rætt til føroyafrádrátt, hevur einki við okkara ríkisrættarligu støðu at gera. Hetta er partur av dupultskattaavtaluni, sum vit í norðurlendskum høpi hava gjørt við Danmark og onnur norðurlond.



Danmark hevur gjørt slíkar dupultskattaavtalur við 75 lond. Skattafrádráttur fyri lesandi er við í 17 av hesum avtalum. Londini, sum hava hesi rættindi, eru so ymisk sum t.d. Ísland, Kina, Ísrael og Spania.

**Nalvaskoðanin**

Føroyafrádrátturin er sostatt ikki eini serlig rættindi, sum føroyingar hava fram um onnur, tí vit eru undir donskum valdi.

Tað einasta, sum er ”serligt” í hesum spurningi, er tann heimføðisliga heimsmyndin hjá sambandsflokkunum. Teir hyggja bara at sínum egna heimastýrisnalva og gerast meira og meira sannførdir um, at hetta ikki bara er vakrasti, men eisini einasti nalvi í heiminum.

Soleiðis er tað ikki. Tað finst ein stórur heimur uttanfyri heimastýrisskipanina.

Karsten Hansen
**landsstýrismaður**

# Skemtifótbóltsdystir í Klaksvík

*Aftur í ár skipar Lions Club í Norðoyggjum saman við teirra lionessum fyri einari skemtifótbóltskapping. Kappingin byrjar kl. 18.30 við skrúðgongu.*

Sum øllum kunnugt, so byrjar Norðoyastevnan longu í dag. Nógv tiltøk verða allar dagarnar – bæði út og inni. Eitt tiltak, sum fyrstu ferð varð roynt síðsta ár, var ein fótbóltskapping millum flakakvinnurnar á Kósavirkinum og Roykivirkinum og millum kvinnurnar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Norðoya Røktarheimi. Hetta tiltak fekk so mikið góða undirtøku, at fyrireikarnir aftur í ár hava gjørt av at skipa fyri hesari kapping.

Í stuttum tíðindaskrivi frá Lions Club verður sagt, at tiltakið byrjar í dag kl. 18.30. Tá fara allar kvinnurnar í skúðgongu frá parkeringsplássinum niðan fyri Klaksvíkar Sjúkrahús heim á fótbóltsvøllin. Fyrsti dysturin, sum er millum kvinnurnar á Kósavirkinum og Roykivirkinum byrjar kl. 19.00. Síðani spæla kvinnurnar á Sjúkrahúsinum og Røktarheiminum. Triði dysturin verður ímillum taparnar, og fjórði og seinasti dysturin verður millum vinnarnar.

Eftir kappingina fær vinnarin ferðasteyp handað. Síðsta ár vóru tað kvinnurnar á Norðoya Røktarheimi sum fór avstað við steypinum. Spennandi verður í ár, um tær aftur í ár fara at vinna hetta steyp. Eins og seinast er meiningin at fáa onkrar framstandandi persónar at verða linjuverjar og dómari.

Áðrenn og undir dystinum verða lutaseðlar seldir. Drigið verður beint eftir dystin. Allir peningurin sum inn kemur fer til vælgerðandi endamál.



# Hans Jørgensen floksskrivari Javnaðarfloksins

Javnaðarflokkurin hevur nú sett floksskrivar í fulltíðarstarv í sambandi við, at Føroya Løgting hevur útvegað tingmanningunum fíggjarligar møguleikar til tess.

*Hans Jørgensen úr Miðvági verður frá 1. juli fulltíðar skrivari hjá Javnaðarflokkinum*

Skrivarin fer at starvast á Gamla Apoteki, og hevur Javnaðarflokkurin gjørt av at seta Hans Jørgensen, lærara úr Miðvági í starv frá 1. juli í ár.

Talan er um fulltíðarstarv, tí Hans Jørgensen skal umframt at vera skrivari hjá tingmanningini eisini røkja uppgávuna sum skrivari hjá sjálvum flokkinum.



HEIMSPREMIERA Í 3'ARANUM




BON JOVI | CRUSH

Nýggja fløgan hjá **BON JOVI "CRUSH"** kemur út í allari verðini samstundis! - sjálvandi eisini í 3'aranum!
**Bon Jovi "CRUSH".........kr. 159,-**

3arin
SMS · Tel. 353535 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo